## Klædnainnsavning í FK handlunum leygardagin

- Hevur tú klæðir ella skógvar í hampuliga góðum standi liggjandi heima, sum tú ikki brúkar? Ella bøkur, lutir ella annað, ið tú hugsar um at tveita burtur? Í staðin fyri at koyra tað út, so kanst tú geva okkum tað, sigur Reyði Krossur. Reyði Krossur Føroya skipar komandi leygardag saman við FK-handlum kring landið fyri innsavning av klæðum, bókum og lutum. Við takksemi tekur Reyði Krossur Føroya ímóti brúkiligum klæðum og skóm, ið verða seld á loppumarknaði ella send út í verðina sum neyðhjálp. Pengarnir frá sølini av klæðunum fara serliga at verða brúktir til at hjálpa menniskum í vanlukkuøkjum og til einsamøll, sjúk og onnur ið líða. Í sambandi við innsavningina av klæðum og skóm fara hjálpararnir frá Reyða Krossi Føroya at taka ímóti lutunum við FK-handlarnar (undantikið í Sandavági) í upplatingartíðini leygardagin tann 15/11 frá klokkan 10.00 til 16.00. Klæðini mugu vera rein og heil. Skógvarnir skulu eisini vera reinir og hava lítið slit.



# Poker og online-spøl stj




*Hóast kanningin um ung og gambling er donsk, er ongin ivi um, at úrslitið eisini kann flytast yvir á føroyskan ungdóm, ið sum kunnugt eisini spæla um pengar, bæði á netinum og heima hjá hvørjum øðrum*

**Ung, sum spæla um pengar, eru í stórum vanda fyri at enda í misnýtslu og kriminaliteti, og tey hava ofta álvarsligar sálarligar trupulleikar at dragast við. Hetta vísir ein nýggj og umfatandi kanning av 30.000 donskum ungdómum, sum ofta spæla um pengar í poker og onlinespølum. Men helmingurin torir ikki at tosa við foreldrini um tað...**

BØRN OG UNG

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ein umfatandi donsk kanning, sum varð almannakunngjørd fríggjadagin vísir, at ungdómar, sum gambla, ella spæla um pengar, trívast nógv verri enn onnur ung.

Greiða niðurstøðan í kanningini er, at ungu gamblararnir eru meiri einsligir og eru oftari tunglyntir. Tey ungu hava lægri sjálvsálit og vánaligari bindindi í skúlanum,, har tey eisini fáa nógv minni frá hondini enn vinfólkini.

Í kanningini verður eisini staðfest, at ungu spælifuglarnir verða oftari happaðir, ella at teir sjálvir happa onnur. Harumframt brúka teir nógv fleiri stimbrandi evni, so sum rúsdrekka og rúsevni, hash og siggarettir, umframt at teir oftari eru kriminellir.

Danska Center for Ungdomsforskning hevur gjørt kanningina um ung og gambling, og vit ivast ikki í, at úrslitið eisini kann flytast yvir á føroyskan ungdóm. Sum øllum kunnugt, er tað eisini sera vanligt millum ung í Føroyum at spæla um pengar, bæði á netinum og heima hjá hvørjum øðrum.

### Foreldrini vita onki

Herfyri vísti ein onnur kanning, sum danska granskingarstovninum SFI, ella Socialforskningsinstituttet, gjørdi, at omanfyri 30.000 donsk ung í aldursbólkinum 12-17 ár spæla so ofta um pengar, at tey hava ein óhepnan spæliatburð og eru í álvarsligum vanda fyri at fáa ludomani.

Í nýggju kanningini, sum varð almannakunngjørd fríggjadagin, er tað sami bólkur av ungum sum verður kannaður, men hesaferð við tí fyri eygað, at kanna óhepnu avleiðingarnar av gambling við atliti til